# Kvinna – eitt vakurt blað

**Hóskvøldið upprann stóra løtan, har Kvinna, fyrsta kvinnublaðið í Føroyum av sínum slagi, varð avdúkað. Sigast skal beinanvegin, at talan er um eitt valaverk, sum gevur lesaranum fatan av, at her hava vit eitt sera professionelt blað. Nógv varð eisini gjørt burturúr, nú blaðið er komið út**

BLAÐÚTGÁVA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Lena L. Mohr er blaðstjóri á Kvinnu, sum júst er útkomið. Blaðið kemur út seks ferðir um árið. Eitt blað afturat kemur tó út í ár, tað verður á gøtuni tann 6. desember*
*Mynd: Jens K. Vang*

– Kvinna – eitt vakurt orð, byrjaði Lena Lindenskov Mohr, blaðstjóri, sína røðu hóskvøldið.

Tað kann gott vera, at orðið er vakurt, men tað er blaðið so sanniliga eisini.

Góðskustøðið er høgt. Ongin ivi um tað. Tá forsíðan varð avdúkað á tíðindafundi í Listaskálanum hóskvøldið, fór eitt sús gjøgnum fólkini, ið hjástødd vóru.

Nógv PR arbeiði hevur verið gjørt til hetta blaðið, men kortini hevur so at siga alt viðvíkjandi blaðnum verið meira ella minni loyniligt og harvið skapt eitt ávíst forvitni millum fólk.

At fólk ganga í spenningi og bíða eftir nøkrum, fær eisini forvæntningarnar at økjast. Tað kann vera vandamikið í summum førum, um nú tað sum koma skal ikki megnar at liva upp til tað, ið fólk vænta. Men tí nýttust útgevararnir av Kvinnu ikki at bera nakran ótta fyri. Tí tann fyrsta útgávan av Kvinnu livir uttan iva upp til væntningarnar.

Forsíðan er sett upp á ein slíkan hátt, at tú verður fangað av henni. Myndin er flott, og vakra kvinnan fangar teg við sínum eygnabrái. Tú fært hug til at síggja meira, og tá tú so fært blaðið í hondina, merkir tú, at her veruliga er talan um góðsku. Seinni sært tú tað eisini, tá tú blaðar blaðið ígjøgnum.

Sum blaðstjórin Lena Lindenskov Mohr segði í røðu sínari, so er tað sjálvandi innihaldið, ið telur mest, men útsjóndin hevur eisini nógv at siga. Á tí økinum livir blaðið so í øllum førum upp til nógvar av útlendsku kappingarneytunum.

## Fjølbroytt innihald

– Vit ynskja at skapa eitt rúm fyri kvinnur, har evni í okkara gerandisdegi hava framíhjárætt. Eitt rúm, har vit kunnu geva og fáa íblástur. Vit hava sett okkum fyri at velja og viðgera evnini í einum viðkomandi føroyskum ljósi, har stórur dentur er lagdur á góðskuna, bæði hvat innihaldi og útsjónd viðvíkur, segði Lena L. Mohr millum annað í røðu sínari.

Hon vísti á, at hóast føroyskar kvinnur í eitt langt áramál hava keypt tey útlendsku kvinnubløðini, so hevur tað mangan verið so, at viðgjørdu evnini ikki hava verið so løtt at sett inn í føroysk viðurskifti.

Innihaldið í Kvinnu er fjølbroytt. Har verður farið í dýpdina við ymiskum evnum, har er portrett av føroyskum kvinnum, sum hava okkurt serligt at siga, eitt ávíst evni verður lýst frá fleiri síðum, mótasíður, vitjað verður í føroyskum heimum, har eru matsíður og eisini hugskot um, hvussu ein kann viðlíkahalda ein føroyskan hava og mangt annað.

– Tað er ofta, at føroyska veðurlagið ikki passar við ráðgevingina um havar, sum kann fáast í útlendsku bløðunum, segði Lena.

Til júst hendan táttin um urtagarðaviðlíkahald, er einasti maðurin á redaktiónini settur. Michael Kjøller Jacobæus er hann, ið kemur við góðum ráðum um urtagarðarnar.

## Heildarkonsept

Kvinna er annað enn blaðið. Í sambandi við at blaðið er komið út, er ein fløga gjørd, sum fólk kunnu ogna sær við at tekna seg sum haldara. Á fløguni eru 12 sangir, sum fremstu tónleikakvinnurnar í Føroyum framføra. Tvær av teimum luttóku eisini á tíðindafundinum í Listaskálanum, Guðrun S. Jacobsen og Lena Andersen.

Umframt hetta er ein heimasíða, www.kvinna.fo. Lena greiddi frá, at endamálið við heimasíðuni fyrst og fremst er at skapa eitt forum, har kvinnur kunnu kjakast ella ráðføra seg við hvørja aðra um ymisk evni. Tað veri seg børn, kærleika ella hvat tað nú skal vera. Á heimasíðuni er eisini ein handil, har kvinnur kunnu keypa beinleiðis av netinum og gjalda fyri síðani at fáa vøruna senda heim til sín við postinum.

Sum heild er nýggja blaðið eitt frískt lot í tí annars til tíðir heldur stirvna blaðheiminum í Føroyum.

– Foreldur míni hava upplivað at fáa tann fyrsta bilin, elektrisitetið og so víðari. Vit hava upplivað at fáa teldu, internet, fartelefon. Er tað ikki upp á tíðina, at vit fáa eitt kvinnublað í Føroyum, spurdi Lena at enda í røðu sínari.

Síðani presenteraði hon redaktiónina á blaðnum, og so tóku Lena og Niclas yvir.

Tað bar til at keypa blaðið á fundinum ella at tekna hald. Hvussu mong teknaðu hald er ikki gott at vita, men meginparturin av fólkunum mundu fara heim hetta kvøldið við einum Kvinnu undir arminum.

Skeptikarar hava kanska hug at spyrja, um hetta fer at bera til. Til tað skal sigast, at um útgevarin og redaktiónin megnar at halda høga støðið, so fer tað at bera seg. Uttan iva.



*Redaktiónina á Kvinnu hesuferð mannaðu frá høgru: Lena Mohr, blaðstjóri, Eyðna Simonsen, Rønn Eliasen, Bjørt Samuelsen, Ingibjørg Jacobsen, Michael Jacobæus, Oddvør Skarðenni og Berit Kloster*
*Mynd: Jens K. Vang*

ítróttur
Nr. 218 • leygardagur • 13. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Toppurin heldur frí

**Bæði hjá kvinnum og monnum kunnu tey í Mjølni slappa av, nú KÍ skal halda 100 ára veitslu**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og við hondbóltskappingini, so verða bara tríggir dystir á flogbóltsskránni hetta vikuskiftið.

Hjá kvinnunum vann TB seg upp á annað plássið, tá tær í vikuni vunnu á ÍF. Nú hava tær so møguleikan at koma ájavnt Mjølni, um tær vinna heimadystin móti Drátti. Nakað sum avgjørt átti at verið góður møguleiki fyri.

Í Sørvági fær SÍ hesaferð vitjan av ÍF. Einki er at ivast í, at ÍF eru favorittar móti uppflytarunum, sum enn hava fyrsta sigurin til góðar, men stríðsviljanum hjá SÍ hevur ikki bilað nakað higartil, so tað kundi kanska hent seg, at tær gera ein vørr.

Hjá monnunum er bert ein dystur á skránni. Hesin er somuleiðis í Sørvági millum SÍ og ÍF, men her eru tað menninir hjá heimaliðnum, sum eru favorittar. ÍF hevur enn einki stig fingið í bestu mansdeildini, og skal SÍ koma ájavnt oddaliðnum úr Klaksvík, so skulu tvey stig til.



*Sørvingar eru favorittar, tá ið fuglfirðingar koma á vitjan í Sørvági*
*savnsmynd*

# Fundurin verður í dag

**Á fótbóltsfundinum skal eitt nú tosast um at leingja landskappingina og at lækka um talið á steypadystum**

EFTIRMETING OG ÆTLANIR
*Jóannes Hansen*

Klokkan tíggju fyrrapartin í dag hevur Fótbóltssambandið stevnt umboðum fyri fótbóltsfeløgini til fundar í FSF húsinum. Á skránni er eftirmeting av farna kappingarári og umrøða av ætlanum fyri árið, sum stendur fyri framman. Fundurin er skipaður við framløgum, bólkaarbeiðum og plenum, har niðurstøður verða gjørdar. Ætlanin er, at fundurin skal verða liðugur klokkan 15.45.

Tað er nógv á skránni, og tískil er ikki serliga rúm tíð sett av til ymsu málini og spurningarnar. Umframt heildar eftirmetingina av farna árinum, eru tvey ítøkilig mál, sum hava við síðsta kappingarár og framtíðina at gera, sett á skránna. Annað er spurningurin um, hvussu smádreingjadeildin skal avgreiðast. NSÍ hevur sett málið á skránna. Tá ið deildin varð avgjørd fyrr í heyst vóru teir í NSÍ ikki samdir við FSF í, hvussu stigini vórðu roknað og harvið heiðursmerkini latin.

Hitt málið snýr seg um, hvussu unglingadeildin skal skipast í framtíðini. Tað er FSF nevndarlimurin Magnus á Stongum, sum síðsta kappingarár var venjari hjá EB/Streyma unglingunum, ið hevur ynskt málið á skránna.

Ein annar spurningur, sum hevur verið frammi í farna ári, og sum nú verður tikin fram, er nýtsla av sjónvarpsupptøkum sum prógv í sambandi við kærumál.

Dómaranevndin hevur sítt, og útbúgvingarnevndin hevur sítt á skránni. Kunnað verður eisini um verkætlanir, sum tað verður arbeitt við í FSF. Hesar snúgva seg um talentmenningina, fótbóltshøllina og sparkivallir, sum tað verður sagt í skránni.

Tosast skal eisini um stuðul og harvið nýtt navn til 1. deild og um beinleiðis sjónvarping av dystum. Síðsta málið á skránni er kunning um kappingina og leikdagar í 2005. Hesin spurningurin varð umrøddur í týsdagsblaðnum.



*Nú skulu fótbóltsfeløgini fundast um at leingja kappingina.*
*savnsmynd*

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**Sunset kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13.11 | 15.00 | VB-Neistin | Kristian Joensen & Karstin Joensen |

**Atlantic Airways kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13.11 | 16.00 | VÍF-StÍF | Heri Petersen & Brandur Johannesen |
| 14.11 | 16.00 | H71-KÍF | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 14.11 | 14.00 | SÍ-ÍF | Mjølnir |
| 14.11 | 15.00 | TB-Dráttur | KÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 14.11 | 16.00 | SÍ-ÍF | Fleyr |

# SÍF vann seinna dystin

**Kappingarnevndin hjá FSF tók í gjár avgerð um, at SÍF komandi kappingarár skal spæla í aðru deild. MB skal spæla í fjórðu deild**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hetta varð úrskurðurin, eftir at MB hevði noktað at fylgt teimum ásetingum, sum Kappingarnevndin hevði álagt feløgunum til seinna dystin móti SÍF. Nevnliga at dómaraseðilin skuldi verða latin inn fríggjadag kl. 17, sum dysturin skuldi verða leygardag.

Tá hetta ikki varð gjørt, varð dysturin í fyrsta lagi avblástur, og mikukvøldið avgjørdi kappingarnevndin so, at SÍF verður dømt at vinna dystin 0-0. Harvið er SÍF samlaður vinnari av dystinu, sum skuldi gera av, hvat av feløgunum skuldi taka sessin hjá ovara stadda liðnum hjá FS Vágum, sum nú er avtikið.

Roknað verður annars við, at tað verður eitt nýstovnað FSV, sum komandi ár fer at spæla fyri SÍF í aðru deild.

# HS hevð aðalfund

Havnar svimjifelag aðalfund mikukvøldið. Á skránni var millum annað val av nevnd, og komu Tórður Patursson, Páll Arni Berg og Anbjørg Apol inn í nevndina sum nývald.

Nýggja nevndin í feløgunum er annars hena: Svend Åge Seloy, formaður, Elsa Klein Olsen, næstformaður, Berit Gunnarsson, kassameistari, Tórður Patursson, skrivari, Katrin Norðfoss, Páll Arni Berg og Anbjørg Apol.
**-jm**